# Vaskibjørn við Mariukeks

*Har mitt í býarlarminum stendur hon brádliga. Vaskibjørnin. Hetta villa náttardjórið við teimum sorgblíðu eygunum. Mitt á degi, á asfaltinum.*

NICLAS JOHANNESEN







Meðan bilarnir drøna eftir gøtunum kemur hon spákandi eftir vegnum.

Heldur døllutt, men samstundis smidlig klintrar hon løtu seinni sum onki upp í trøini, niðuraftur og síðani víðari eftir asfaltinum við tveimum heldur skeptiskum, men kortini forvitnum, kettum í hølunum. Har stendur hon so. Beint uttanfyri køksvindeygað.

Ein kráka kemur flúgvandi. Hon er í øðini, skilst á hennara serstakliga ljóta tóna. Men vaskibjørnin tykist fullkomiliga óávirkað. Henni dámar krákuegg.

**Idyllurin er brotin**

Fólk her á leiðini siga, at hetta er gerandiskostur.

Vilsta vaskibjørnin er ikki meira vilst enn so, at hon dusar sær í ymsum skrellispannum í grannalagnum. Hon sigst at hava eina turnus-skipan, har hvør gøtan við skrellispannum fær sítt tørn.

Ongin ivi er heldur um, at vaskibjørnin hevur brotið vakt og fyri vist eisini normina fyri, hvussu ein miðal hampa vaskibjørn livir og uppførir seg. Vanligt er, at vaskibjørnin svevur um dagarnar og arbeiðir um næturnar.

Tað vísir seg eisini, at hon onki leggur í frukt so sum peru og súrepli. Men tá nakrar mariukeks vera blakaðar eftir henni, vendir hon sær, tekur í lógvarnar og etur av hjartans lysti.

Veruleikin er stórbýur, asfalt, bilar - og har mitt í meldrinum: Ein vaskibjørn við eini mariukeks.

*Hesar myndirnar eru tiknar í Vancouver. Vaskibjørnin gekk mitt millum húsini og dusaði sær*

# Ongantíð er dámligt at avmarka

*Oftast eru avgerðir um at avmakað ópopulerar, men slíkar avgerðir eiga vit at taka, um tær bera fram í tíðina, heldur enn bert at fylgja við fólkastreyminum júst nú, sigur fiskimálaráðharrin*

ÓLAVUR Í BEITI



–Viðvíkjandi lemmatrolarnum vil eg kalla tað ein sigur í lagnunar speiðsemi. Fyri gott einum ári síðan, setti eg í gildi nýggja skipan fyri lemmatrolarar. Frá at teir høvdu hjáveiðiprosent í toska- og hýsuveiðu, ásetti eg hjáveiðikvotu av hesum fiskasløgum. Politiskt havi eg fingið manga skoluna fyri hesa avgerð, samgongumenn hava tosa um møguligt lógarbrot og møguligt missálit, men eg havið hildi fast, sigur Jørgen Niclasen í viðmerking til álitið frá Vinnunevndini.

– Nú, eg havi skotið upp at fáa lemmatrolarnar undir fiskidagaskipanina, sigur ein samd Vinnunevnd at lemmatrolarnir skulu halda fram við skipanini við hjáveiðukvotuni. Tað vil eg kalla eitt herðaklapp, ið tó kom yvir eitt ár eftir at skipanin var sett í gildið.

**Harmast**

– Men eg má samstundis harmast, at orðingin hjá Vinnunevndini ikki gevur lemmatrolarnum greið boðum, hvussu framtíðin hjá teimum sær út. Vinnunevndin tekur í høvuðsheitum undir við at fáa teir undir fiskidagaskipanina, men er samd um at mæla til at halda fram við hjáveiðikvotu.

– Hesin parturin av flotanum hevur sanniliga krav upp á at fáa at vita hvussu verður í framtíðini, sigur Jørgen Niclasen.

**Greið boð**

– Viðvíkjandi niðurskurðinum í fiskidagatalinum upp á 5% vil eg siga, at tað ongantíð er dámligt at avmarkað. Oftast eru avgerðir um at avmakað ópopulerar, men slíkar avgerðir eiga vit at taka, um tær bera fram í tíðina, heldur enn bert at fylgja við fólkastreyminum júst nú, bert við politiskum løtuvinningi fyri eyga. Tí politikkur er eisini at tora.

– Tað, at ein samd vinnunevnd nú mælir til at hava óbroytt fiskidagatal, vil føra við sær eina øking í veiðiorkuni. Vit hava sæð seinnu árini, at fiskidagarnir verða betur fullnýttir, tvs. At fiskidagar, sum hava ligið óbrúktir, verða brúktir og tá økist veiðitrýsti. Men tað er eingin vandi á ferð, tí økingin er lítil. Vinnunevndin hjá løgtinginum hevur nú gjørt sítt tilmæli og tað takið eg til eftirtektar og farið at arbeiða útfrá.

– Samstundis má sigast, at hetta eisini vísir, hvussu umráðandi tað er at fáa fráboðaða orðaskiftið um framtíðar fiskivinnupolitikkin til aðalorðaskifti í løgtinginum. Vit eru í fiskimálastýrinum í ferð við orðað henda, sum verður lagdur fyri løgtingi í heyst til orðaskifti. Tað er neyðugt at vinnan fær greið boð frá politiska myndugleikanum, hvussu framtíðin hjá teimum sær út, sigur fiskimálaráðharrin í viðmerking.



**Ítróttur**
e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum: www.sosialurin.fo

# Úrlætnir inn at skinninum

*B36 megnaði at halda tætt í ein hálvan tíma. Í 2. hálvleiki vóru føroysku spælararnir klossutir statistar á váta vøllinum, har AB menninir høvdu uppvísin*



*Jens Kristian Hansen royndi ikki at fjala út yvir, at AB var so nógv tað betra liðið hóskvøldið*

JÓANNES HANSEN, GLADSAXE

At vera viðhaldsmaður hjá føroyskum fótbóltsliðið í altjóða høpi er sjáldan hugaligt. Spurningurin er aloftast, hvussu leingi tað fer at eydnast at halda tætt á vøllinum, og tá mótstøðuliðið hevur fingið hol á, er næsti spurningurin, nær næsta málið kemur, og um talan fer at verða um skrædl.

Í reginum á Gladsaxe Stadion í Keypmannahavn sá tað gott út fyrsta hálva tíman. Sjálvt um støðan í steðginum var 2-0, so bendi lítið á, at úrslitið skuldi gerast størsta avhølvingin, sum eitt føroyskt lið nakrantíð hevur lagt rygg til tey níggju árini, sum tey hava verið í Europa cup.

**Góða løtan**

B36 var ikki komið til Kongens København fyri at undirhalda. Mariniak var einsamallur á toppinum, og hóast B36 í 13. minutti fekk fyrsta hornasparkið í dystinum, so vóru royndirnar frameftir fáar, og AB málverjin slapp ongantíð at vísa, at hann er ein tann stinnasti í Danmark.

B36 verjuspælið far fínt fyrsta hálva tíman. Mikkjal Thomassen og Jákup á Borg høvdu gott tak á nýklækta landsliðsmanninum, spirrivippinum Michael Johansen. Jan Guttesen og Klæmint Matras arbeiddu sum óðir mitt fyri, Darius vann luftbótlarnar, Jens Kristian brúkti allar sínar altjóða royndir, og Egil Zachariassen tetti væl.

Mikkjal, Jákup, Jens Kristian og Magni á Lakjuni, sum var verjukendur í vinstru, dugdu væl at traðka á bóltin, snara mótstøðumann av sær og spæla skilagott, men kom ongantíð broddur í framrættaða spælið.

**Mistøkini**

B36 menninir runnu nógv, og tað kostaða á váta og harvið tunga vøllinum Tá tu troyttast verður vandin fyri mistøkum størri, og hóast manngarðin kring brotsteigin tóktist tættur, so kom fyrsta málið alt nærri. At tað í 1. hálvleiki eydnaðist AB at skora upp á teir báðar møguleikarnar, sum teir fingu mál uppá, var fyrst óheppið og síðani kleyvarskapur.

Jens Kristian hansen lá skaddur uttanfyri vøllin, tá AB fór ígjøgnum hjá Håkan Lundholm, sum alla tíðina hevði tað strævið í vinstru . Besti maður á vølli, Jan Michaelsen, stútaði spakuliga, bólturin stiklaði eina ferð og sær inn um stólpan.

1-0 hevði ikkiv erið so galið eftir 45 minuttir, men í síðsta álopinum undan kærkomni hvíldini, ber B36 mistak brotsspark við sær. Havnarmenninir stóðu og kikkaðu eftir ondini, meðan AB tók stutt horna í høgru, raski Jákup á Borg leyp út á baklinjuna at takla, Jan Michaelsen fór um koll, so varð brotsspark og mál.

**Skipbrotið**

»Tempo, tempo« rópti landsliðsmaðurin, Brian Steen Nielsen, síðsta korterið av fyrra hálvleiki. AB hevði ætlað við skjótum spæli at køva B36. Í 1. hálvleiki var ferðin ikki serliga høg, og tað kom væl við hjá B36. Í 2. hálvleiki fór AB úr 3. upp í 5. gear, meðan B36 hekk eftir í 2.

At AB skoraði til 3-0 í fyrsta álopinum eftir hvíldina, tók luftina og mótið frá B36. Tey trý korterini vórðu ein total eyðmýking av førosykum liðfótbólti, og fyri teir neyðats spælararnar var tað ræðuligt at verða soleiðis hildin fyri tað turra spott.

Tróndur Vatnhamar hevði fleiri bjargingar, útispælararnir tveittu seg og blokeraðu fleiri royndir, men teir megnaðu ikki at forða fyri, at AB í 25 minuttir skoaraði seks mál. Høvdu teir ikki havt tikið sær av løttum seinastu 21 minuttirnar, so tað væl verið, 0-10 ósigurin hjá HB í Inter-Toto Cup hevði staðið fyri falli.

**AB-B36 8-0 (2-0)**

1-0: Jan Michaelsen 33.
2-0: Machael Johansen 45. (br.)
3-0: Rasmus Daugaard 46.
4-0: Abdul Sule 58.
5-0: Abdul Sule 58.
6-0: Peter Rasmussen 67.
7-0: Jan Bjur 69.
8-0: Jan Michaelsen 69.

**AB:**

Jan Hoffmann - Lars Bo Larsen, Nicolaj Hust, Jan Bjur, Martin Albrechtsen, Jesper Sørensen - Peter Rasmussen, Brian Steen Nielsen, Jan Michaelsen - Abdul Sule, Kaan Metin

**B36:**

Tróndur Vatnhamar - Mikkjal Thomassen, Darius Magdisauskas, Egil Zachariasesen, Jens Kristian Hansen, Håkan Lundholm - Jákup á Borg, Jan Guttesen, Klæmint Matras, Magni á Lakjuni - Maciej Marienak

# Landsliðið er farið

*Hóast rimmar avrikið hóskvøldið, heldur Bartal Eliasen seg ikki vera nærri landsliðnum nú enn undan dystinum*

JÁKUP MØRK

Einki er at taka seg aftur í, at stóri maðurin í Gøtu hóskvøldið var fuglfirðingur.

Bartal Eliasen spældi ein rimmar dyst í miðverjuni, og eftir dystin tóktist hann eisini nøgdur um avrikið.

**Ov stóra virðing**

Tá hann í síni tíð, skifti frá ÍF til GÍ, var tað millum annað tí, hann við hesum fekk møguleika at spæla júst slíkar dystir. Uttan at siga ov nógv um egna avrikið, var hansara meting eftir dystin, at liðið hevði staðið seg væl:

- Vit høvdu ov stóra virðing fyrstu løtuna, men eg haldi at vit spæla okkum væl upp, og at enda helt eg okkum vera omaná, tá hugsað verður um spælbýti, helt hann fyri eftir dystin.

Hann legði eisini afturat, at hann serliga var fegin um tað avrik, sum ungu leikararnir sýndu. Hóast hesir ikki hava nakrar serliga royndir, so helt Bartal, at hesir veruliga høvdu prógvað, at knotur eru í teimum.

Tá vit at enda spurdu hann, um hann eftir henda dystin helt seg vera komnan eitt fet nærri landsliðinum, var svarið noktandi:

- Nei, tað sær út til, at eg langt síðani eri skippaðr í so máta.

Hvørt hetta er rætt ella ikki, skal ikki verða gitt um her, men um avrikið hóskvøldið verður framhaldandi støðið hjá Bartali, kunnu landsliðsvenjararnir neyvan síggja burtur frá honum í longdini



*Óaktuellur til landsliðið? Tað heldur Bartal í øllum førum sjálvur*

***Myn: Álvur Haraldsen***

# Fáa kanska frívakt

*B36 liðformaðurin, Jens Kristian Hansen, bar ikki so nógv í bøtuflaka fyri stórtapi móti AB*

Hann ásannaði, at tað er stórur munur á bestu deildini í Danmark og í Føroyum, men mest royndi B36 maðurin vísti eisini á, at fleiri av liðfeløgunum sóu meira klossutur út, enn teir eru:

- Vit eru ikki so vanir at spæla á vátum grasi. Mikudagin fái eg saman við liðfeløgunum á landsliðnum høvi til at vísa, at munurin er væl minni, enn hann var í dag, og tað gleði eg meg til, segði Jens Kristian Hansen við tíðindamenninar.

**Fáa kanska frí**

Í AB var lagið gott. Brian Steen Nielsen og Michael Johansen skulu til Føroya mánadagin. Teir eru úttiknir til landsdystin mikudagin.

Hósdagin í aðru viku skal AB spæla á Tórsvølli. Tá kann tað væl vera, at landsliðsmenninir sleppa frá at fara aftur til Føroya:

- Eingin ivi er um, at vit hava vunnið samanlagt. Vit hava nógvar dystir á skránni, og vit fara at umhugsa møguleikan at lata spælararnar, sum tað er størst trýst á, hvíla seg, segði AB venjarin, Flemming Christensen.

JH